Henning Jacobsen, landsverkfrøðingur:

– Vit føroyingar eiga at ráða í oljuvinnuni

-Vit eiga sjálvi at ráða yvir gongdini í oljuvinnuni. Gera vit ikki tað kemur alt hetta mistonkiliga uppí og endin verður, at vit tá fara at tveita frá okkum og lata alt upp í hendurnar hjá øðrum og harvið verður tað fyrst og fremst út frá teirra fyritreytum

Jan Müller

Vit eiga at sjálvir at ráða - bestemma

Henning Jacobsen heldur, at vit skuldu verið soleiðis fyri, at vit føldu, at tað vóru vit sum ráddu – bestemmaðu. Føla vit ikki hetta, at tað eru vit, sum bestemma, so verður tað altíð til hetta mistonkiliga, hví hesin fekk hetta og hin hatta. Vit hava tá lyndi til at blaka frá okkum og siga við aðrar gerið hatta fyri okkum, og tá verður tað uppá tær premissur, sum teir nú einaferð finna út av.

-Tað er tí at skapa og fáa ta insightvitanina í landinum so skjótt sum yvirhøvur tilber, soleiðis at vit føla, at tað eru vit sum hava avgerandi orðið um, hvat hendir.

Henning Jacobsen sigur víðari, at tá hann úttalaði seg um hetta málið herfyri, var tað ongantíð meiningin at landsverkfrøðingsstovnurin skuldi keypa boritorn og bora í Lopra. Hevur nakar skilt tað uppá tann mátan, so er tað í "ond trú" sum hann mælber seg.

-Men tað var at vera við á fyrstu hond, soleiðis at vit føldu, at vit føroyingar vóru við til at gera av - eisini á tí tøkniliga økinum – hvat hendir, og soleiðis at vit fingu fólk, sum til næstu ferð vistu meira.

-Men hvat heldur tú er høvuðsorsøkin til, at ein stovnur sum oljufyrisitingin samþart tíni egnu úttalilsum ikki vil hava ein stovn sum landsverkfrøðingsstovnin uppí fyrireikingina av oljuvinnuni?

Tað nærmasta eg kann koma til er tað, sum Árni Ólafson segði við Sosialin, har hann líka sum gjørdi gjøldur burtur úr stovninum við niðurlátandi at spyrja, hvat ein "vejdirektørur" og ein heilsumálaráðharri hava at gera í eini oljuvinnu (Heilsumálaráðharrin Andreas Petersen úttalaði seg í Sosialinum um, at landsverkfrøðingurin átti at havt verið við í oljuráðleggingarnevndini. Tá Sosialurin spurdi Árna Ólafson, hvat hann helt um hetta svaraði hann, at hann hevði onga viðmerking til, hvat ein heilsumálaráðharri helt um hetta, blaðm.)

LVF við í oljuráðleggingarnevnd

Hevði landsverkfrøðingurin verið í oljuráðleggingarnevndini frá byrjan hevði tað so sæð øðrvísi út við tí tøkniliga partinum?

-Tað havi eg ikki ánilsi av. Eg hevði bara hildið, at tað var natúrligt, at vit áttu ein sess har longu tá. Eg vil ikki vera bakklókur, men eg haldi, at tað varð gjørt við vilja at útihýsa ein stovn, sum eg helt hoyrdi heima í hasum hópinum.

Hvat hevði tú sagt til, at t.d. landsverkfrøðingsstovnurin, ein annar stovnur ella fyritøka í Føroyum hevði nøkur fólk sum vóru við í arbeiðinum hjá Dopas í sambandi við Loprans projektið?

Tað hevði verið eitt modell. Oljufyrisitingin kundi eisini sagt, at Dopas fekk hesa uppgávu men undir yvirstýring av t.d. Landsverkfrøðingsstovninum. Tað hevði eg hildið hevði verið heilt natúrligt, tí tað er hóast alt okkara øki. Tvs. at vit áttu projektið men keyptu okkum vitanina. Tað gera vit í so nógvum øðrum.

Henning Jacobsen, landsverkfrøðingur. -Tað mátti verið uppgávan hjá politikarunum at fingið tveir almennar stovnar at virka saman sum frægast. Her Landsverkfrøðingsstovnurin og Oljufyrisitingin

---

Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini:

Nógvar atfinningar byggja á misfatanir

-Sjálvandi kunnu vit mistaka okkum., og tað er væl møguligt, at vit hava mistikið okkum í ýmsum, men í fleiri av teimum viðurskiftum, sum hava verið frammi í fjølmiðlunum, og har funnist hevur verið at oljufyrisitingini, byggir hetta á misskiljingar

Jan Müller

-Vit eru ikki lidnir við hesar samráðingar, so løgmaður hevur enn onga frágreiðing fingið.

Hetta sigur Martin Heinesen leiðari á Oljufyrisitingini í sambandi við, at løgmaður herfyri bað stjórarnar á Landsverkfrøðingsstovninum og Oljufyrisitingini um at koma við einum uppskoti til samstarv millum teir báðar stovnarnar í tilrættaleggingini av eini komandi oljuvinnu.

Uppá fyrispurning um tað í heila tikið ber til at fáa eitt skilagott samstarv og harvið landsverkfrøðingsstovnin uppí menningina av eini oljuvinnu, soleiðis sum løgmaður hevur lagt upp til sigur Martin Heinesen, at tað dugir hann ikki at siga nú. Tað fer tíðin av vísa.

Men hevði tað t.d. havt verið verið rætt at latið ein stovn sum landsverkfrøðingsstovnin komið meira inn í myndina frá byrjan eitt nú í sambandi við Loprans-projektið?

-Lopranprojektið er ein ætlan, sum 18 oljufeløg hava fingið loyvi til og Dopas/Danop eru teirra operatørar.

Men tit hava biðið Dopas taka sær av hesum projektinum?

-Tað var frá fyrstan tíð av og tað var av reint praktiskum grundum, tí vit máttu hava eitt felag, sum hevði skil fyri hasum slagnum av arbeiði. Tað var sjálvandi ikki uppá tal at brúka Landsverkfrøðingsstovnin til tað arbeiðið, tí tað hevur hann ongar royndir í.

Men hyggur tú nú aftur um bak, hevði tað tá ikki verið skilagott, um fólk frá hesum stovninum t.d. høvdu ettir lit/eygleiðarastatus ella vóru við í projektinum, soleiðis at tú harvið inntørdi føroyskar teknikarar í henda nýggja problematikkin?

-Landsverkfrøðingsstovnurin hevur eitt standandi tilboð frá okkum um at hava fólk sum eygleiðarar í Lopra, tað hevur hann fingið fyri fleiri mánaðum síðani.

LVF hevði ikki ekspertisuna vit skuldu brúka

Men hvat sigur tú til kritikkin frá LVF um, at okkara myndugleikar heilt hava gloymt føroyingar, tá talan er um tann tøkniliga partin av eitt nú Loprans projektinum?

-Eg haldi ikki. Vit hava gloymt tann tøknifrøðiliga partin. At vit ikki hava brúkt LVF so nógv er av reint praktiskum ávum, tí vit hava ikki mett, at hesin stovnurin hevði ta ekspertisuna, sum vit júst tá høvdu brúk fyri.

-Men hvat hevur tú at siga til orðini hjá Landsverkfrøðinginum um, at teknikkarar frá hesum stovninum áttu at havt verið inni í myndini so tíðliga sum gjørligt í tilrættalegging ttv kanningum í sambandi við eina oljuvinnu?

-Eg havi ikki nakra serstaka meining um LVF sum stovn sum so. Henda skrivingin hjá Sosialinum er vorðin so stovnsfikserað, at eg havi ikki so nógvar viðmerkingar til tað.

Tað er nú ikki Sosialurin, sum frá fyrstan tíð er komin við hesum kritikkinum, tað er landsverkfrøðingurin sjálvur. Vit hava borið hansara orð víðari.

-Eg hoyri tað.

Men hvat sigur tú sum leiðari av oljufyrisitingini til, at LVF náttúrliga átti at komið inn í myndina í sambandi við eina oljuvinnu, nú hann kanska er tað forum, har mest teknisk ekspertisa í Føroyum er savnað?

-Tað fari eg avgjørt ikki at siga nakað um. Nú verður tokuserað so nógv uppá ein ávísan stovn sum landsverkfrøðingin. Tað havi eg ongar serligar viðmerkingar til.

Eg haldi tit áttu heldur at tosað við hann um tað.

Men nú er arbeiðið hjá Dopas í Lopra seinkað í tveir mánaðir, og onkur heldur kanska, at høvdu staðkend fólk her heima t.d. LVF ella føroyingar í annan máta verið við í projektinum, so hevði hetta kunnað verið fyribyrgt?

-Eg siggi hvat tit skriva.

Vit skrúvaðu Loprans-projektið saman

Men eru tað ikki Oljufyrisitingin og ráðleggingarnevndin sum hava havt ábyrgdina av, at Loprans-projektið er farið til Dopas?

Vit hava skrúvað hetta projektið saman. Tað er annars eina rúgva av misskiljingum í hesum projektinum úti í fjølmiðlunum. Eg havi valt ikki at tosa so nógv nú, tí tað er ein fyrispurningur í tinginum um hetta sama.

So tey viðurskiftini, sum hava samband við projektið í Lopra gangi eg út frá verða svarað av løgmanni.

Men eingin er fullkomin. Oljufyrisitingin kann væl eisini mistaka seg ella!

Sjálvandi kunnu vit eisini misstaka okkum. Tað er eisini væl møguligt, at vit hava misstikið okkum í ýmsum, men í fleiri av teimum viðurskiftum, har Sosialurin hevur víst á, at vit hava tikið feil, har er tað grundað á misskiljingar.

Martin Heinesen, jarðfrøðingur og leiðari á Oljufyrisitingini, er ein av pionerunum í øllum oljuspurningunum. Mynd Jan Müller